# avnar elag fyri krónur

## Hann hevur brúkt pengarnar hjá felagnum til sítt egna forbrúk



**SNÝTTI HAVNAR RÓÐRARFELAG**

*Hóast hann líka til tað seinasta tvíhelt um, at hann var reinur sum fuglurin, trúði dómarin í Føroya Rætti ikki einum manni, sum varð álærdur fyri at hava snýtt Havnar Róðrarfelag fyri nógvar pengar. Rætturin sigur, at ongin ivi er um, at forkláringin hjá manninum skuldi skúgvaast til viks, Maðurin sjálvur sigur, at havnar Róðrarfelag var hansara hjartabarn*

## Tað var kríggj ímillum nevndarlimirnar

um tvær vikur, altso beint fyri ólavsøku.

Hann varð eisini dømdur heili 10 mánaða fongulsrevsing, men tað sleppur hann undan at sita, vil hann ganga undir ávísar treytir.

Ein treyt er, at hann onki revsivert ger í tvey ár. Ein onnur treyt er, at hann skal arbeiða fyri onga løn í 200 tímar. Hann skal eisini vera undir eftirlit av kriminalforsorgini í eitt ár og í hesum sambandi skal hann eisini í viðgerð fyri rúsdrekkamisbrúk, tí hann ført varð fram í rættinum, at rúsdrekka hevði verið rótin til nógvar av teimum trupulleikum, hann hevði rótað seg upp í.

Báðir partar umhugsa nú um teir skulu góðtaka dómin ella um teir skulu skjóta hann inn fyri landsrættin.

*aki@sosialurin.fo*

## Maðurin hevur borið seg skítbýtt at

# Heljarstríð í Havnar Róðrarfelag

Áki Bertholdsen

Dómurin, upp á 10 mánaða treytað fongsul, sum ein maður fekk týsdagin fyri at snýta Havnar Róðrarfelag, liggur nakað mitt ímillum tað, sum ákærin kravdi og tað, sum verjin helt, kundi koma upp á tal í einum føri sum hesum.

Ákærin kravdi, at maðurin varð dømdur at sita í 10-12 mánaðir, men skuldi dómarin komið til ta niðurstøðu, at hann skuldi sleppa undan at sita ein part av fongsulsrevsingini, skuldi maðurin vera undir eftirliti.

Hann meinti, at talan var um serstakliga groft lógarbrot, tí maðurin hevði havt eitt álitisstarv í einum ítróttarfelagi.

Men hetta álit hevði hann brúkt til at taka pengar frá felagnum til at fíggja sína egnu, privatu nýtslu.

Hinvegin helt verjin hjá manninum, at talan kundi ikki verða um strangari revsing enn ein treytaðan dóm, men hann átti ikki at fara upp um fýra mánaðir-kanska kombinerað við eini samfelagstænastu.

### Beiskt persónsstríð

Verjin ásannaði, at maðurin hevði borið seg "skítbýtt at", men hann helt ikki, at tað kundi staðfestast, at talan var um at snýta nakran.

Hann vísti á, at illstøða var íkomin ímillum nevndarlimir og tað hevði gjørt felagslívið í Havnar Róðrarfelag til eitt heljarstríð.

- Tað hevur verið eitt beiskt persónsstríð í felagnum segði hann.

Eitt dømi um, at ósemjan í Havnar Róðrarfelag, at sálvt ABC samgongan er sum ein sunnudagsskúli afturímóti, er, at tað eina ári vóru tveir ársroknskapir gjørdir yvir virksemi felagsins.

Maðurin, sum er ákærdur fyri at hava snýtt felagið, hevur ført fram, at øll skjølini, sum viðvíkja hansara peningaviðurskiftum í felagnum, eru burturbeind fyri at skaða hann.

Verjin helt ikki var heilt ósannlíkt, tá ið hugsað verður um, hvussu støðan var.

Hann vísti eisini á, at óskil hevði verið í felagnum og at nógv av arbeiðnum var í sjálvdrátti, men kortini til felagsins besta.

Og í einum ítróttarfelagi, sum øll brenna fyri, eru tær vanligu eftirlitsmekanismurnar viðhvørt ikki so neyvar, sum tær kanska eiga at vera og tað er ikki altíð so góður ordan í.

Hóast verjin ásannaði, at skjalprógv ikki kundi førast fyri so vísti hann kortini á, at summir av lutunum, sum maðurin segði, at pengarnir vórðu brúktir til, vóru til skjals, sum prógv fyri, at pengarnir vóru ikki farnir í hansara egna lumma.

Hann nevndi ein bátavogn og tveir málningar sum dømi um tað.

- Tað eru ongi skjøl, sum vísa, at hesir lutir eru goldnir aðrastaðni frá, legði verjin afturat.

*aki@sosialurin.fo*

## Dømd at arbeiða fyri onki

Hetta seinasta hálva árið er eitt nýtt hugtak komin inn í føroyska rættarsiðvenju og tað er heitið "samfelagstænasta".

Hetta hevur verið kent úr øðrum londum í nógv ár, men er nú eisini sett í gildið í Føroyum.

Tað er, at ákærd, sum fáa dóm í rættinum, kunnu verða dømd at arbeiða eitt ávíst tímatal fyri onga løn. Hetta kann vera sjálvstøðug revsing, ella sum ein partur í eini revsing, akkurát sum í málum um mannin, sum er dømdur fyri at hava snýtt Havnar Róðrarfelag.

Tað stendur so til Kriminalforsorgina at finna eitt hóskandi arbeiði til tey, sum fáa dóm um at gera samfelagstænastu.